## ES krevur størri skerjing

Formansskapurin í ES er als ikki nøgdur við tey málini, sum lond hava sett sær undan veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn. Tað segði svenski forsætisráðharrin, Fredrik Reinfeldt, á toppfundi millum ES og Kina um vikuskiftið. Svøríki hevur formansskapin í ES hetta hálvárið. Fredrik Reinfeldt segði, at tær CO2-skerjingar, sum eru komnar á borðið tær seinastu vikurnar, eru als ikki nøktandi, og at londini mugu gera meiri. Kina og USA, sum eru tey londini, ið hava tað størsta CO2-útlátið, hava boðað frá, hvussu nógv tey ætla at skerja útlátið. Hinvegin hevur India einki sagt enn, skrivar DR.



# Útlitini fyri fiskiflotan betrað

**Jacob Vestergaard hugleiddi eitt sindur um landbúnaðin og serliga fiskivinuna á landsfundi Fólkaflokksins leygardagin**



*Jacob Vestergaard greiddi frá sínum málsøki á landsfundi Fólkafloksins leygardagin*

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hann helt, at sambært kanningunum hjá Peturi Steintún, so sær gott út við toskastovninum eins og í 90-unum, tá hann rættiliga tók seg upp.

Línuflotin hevur tillagað seg og er vorðin minni.

Tað var eitt øgiligt trýst á trolaraflotan í fjør tá oljuprísurin var so høgur, men hann er tíbetur nú farin niður aftur, og fyrra hálvár var gott hjá tí partinum av flotanum við góðum upsafiskiskapi. Støðan er eitt sindur lakari aftur nú.

– Um vit samanbera við aðrar skipanir uttan um okkum, so er okkara fiskidagaskipan hin besta, og áhugin fyri henni er vaksandi. Eg var í Skotlandi herfyri og greiddi frá og skal niður til Brússel í morgin at greiða Joe Borg, fiskimálakommiseri í ES frá føroysku skipanini, segði Jacob Vestergaard.

Hann metti, at tað fer at veða neyðugt at tillaga trolaraflotan eisini, tó at tað verður svárt hjá teimum, sum mugu fara út. Hinvegin verður tað so tað betri fyri teir, ið eru eftir.

Jacob Vestergaard nevndi eisini lemmatrolararnar, og at arbeitt verður við einari skipan, har teir eisini koma inn í fiskidagaskipanina. Spurningurin er so, um tað verður neyðugt at tillaga tann partin av flotanum eisini.

Hann kom eisini inn á tey 62.000 tonsini í suðurhøvum og helt, at tað er eitt gott íkast.

Vónandi kunnu vit fáa virkað nakað av sild til matna á landi í Føroyum, kreftir eru í holt við at lata Kollafjørð Pelagic upp aftur, segði Jacob Vestergaard.

### Samráðingar

Svartkjafturin er undir trýsti og tað sá út til, at kvotan fór at minka, men hon helt sær á nøkurlunda sama støði tá avtornaði.

– Vit hava sett krav fram um, at vit skulu hava størri part av makrelinum í samráðingunum við norðmenn. Vit noktaðu at skriva undir eina avtalu í heyst uttan so, at vit fáa eina munandi størri makrelkvotu enn vit hava nú, segði Jacob Vestergaard.

Hetta hevur so ført til at eingin avtala er um makrelin. Hann hevur ført fram mótvegis norðmonnum, at hóast ósemja er um eina avtalu, eigur hetta ikki at ganga út yvir aðrar avtalur eisini.

– Vit mugu finna út av tíðliga í 2010, hvussu vit áseta okkara egnu makrelkvotu. Og tað verður ein spennandi avbjøoðing, segði Jacob Vestergaard.

– Føroyar skulu til samráðingar við russar í komandi viku, og vit hava stórar trupulleikar við russarí løtuni við tað, at Skálaberg liggur í Murmansk, men vit hava sett øll segl til fyri at loysa hendan knútin. Ein stór sendinevnd kemur til Føroya mánadagin, so vónandi fæst ein loysn tá, og tað fer at hava sttóran týdning at fáa eina fiskiavtalu í lag við russar, eisini sæð í ljósinum av, at vit kanska onga avtalu fáa við norðmenn, segði Jacob Vestergaard.

Hann væntaði tað fór at verða trupult at fáa størri toskakvøtu, sjálvt um TAC'ið í Barentshavinum er farið upp, tí teir stovnarnir, vit lata afturfyri til russar, eru í minking.

At enda segði fiskimálaráðharrin, at hann ætlar at fáa brúksskyldu inn í fiskiskipanina, og vónar eisini at fáa eitt kjak um umsetiligheitina.

# Mugu síggja álvaran í kreppuni

**Bjarni Djurholm ávaraði bæði flokkin og Føroya fólk sum heild um ikki at taka kreppuna ov lætt**

LANDSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hann kendi seg hava nakrar royndir á politiska pallinum, men hann helt tað vera hugvekjandi, tað sum gongur fyri seg í tinginum, men ikki á ein positivan hátt.

Tað tykist ikki at rína við, at vit tátta fram ímóti einari milliard í halli á fíggjarlógaruppskotinum.

Hann segði tað verða neyðugt at taka nøkur stig, men tað verður ikki lætt, tí talan verður um tung tøk.

Bjarni Djurholm nýtti eisini høvið at rósa Thomas Dam fyri fyrilesturin og endurtók metingina hjá búskaparfrøðinginum um, at bert helmingurin av undirskotinum á fíggjarlógini stavar frá kreppuni.

Hann kom eisini inn á skattapolitikkin og nevndi skattalættingarnar, sum flokkurin hevði staðið fyri. Men hann harmaðist samstundis um, at vit hava hægsta marginalskatt yvirhøvur.

Skattalættarnir svaraðu til eina reallønarhækking sum svaraði til 7 krónur um tíman, vit hava annars klatra upp eftir skattastiganum í mong ár framman undan, segði Bjarni Djurholm.

Hann segði, at vit eru 40.000 skattgjaldarar í Føroyum. Helmingurin, ella 18.500, liggja á einari inntøku á undir 150.000, og tey rinda 82 milliónir í skatti, svarandi til seks prosent. Hinir 21.500 rinda so tey eftirverandi 94%.

Fólk flest merktu ikki skattalættan so nógv, tí pengingurin varð í staðin fluttur yvir á pensjónsskipanina.

Hann nevndi eisini økingin í almennu útreiðslunum seinastu árini, ið er 15 ferðir sjómannafrádráttin.



*Bjarni Djurholm ávaraði um ikki at taka kreppuna ov lætt*